| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. mei 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 05/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann 29. mei kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. mei 2008 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Signar á Brúnni
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Súsanna Gaard
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Jón Nolsøe Olsen hevur við telduposti til borgarstjóran, dagfest 26. mei 2008 boðað frá, at hann ikki kemur at møta á fundinum av persónligum ávum. Hann heitir á borgarstjóran um at kalla varalimin á lista B Súsonnu Gaard inn sína vegna. Hesin hevur tosað við hana um hesi viðurskifti, og møtti hon eftir áheitan hansara á fundinum.

**Mál nr. 29/2008.**

**Viðvíkjandi reglugerð fyri teknisku deild kommununar.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot til *"Reglugerð fyri teknisku deild hjá Fuglafjarðar kommunu"*, sum formaðurin í nevndini hevur biðið um, grundað á , at arbeiðsgongdin í deildini ikki virkar nóg væl, og mælir hann nevndini til at taka undir við uppskotinum og senda tað víðari til fíggjarnevndina til viðgerðar.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt uppskotið á fundi 21. mei 2008 og varð hetta gjøgnumgingið á fundinum.

Nevndin mælir fíggjarnevndini og býráðnum til, at arbeiðsgongdin verður broytt soleiðis, at kassin við maskinførara verður tikin burturúr verkskipanini (organisatiónsplaninum).

Eisini verða smávegin broytingar gjørdar í reglugerðini, og skal Menningar- og mentanarleiðarin rætta hesa samsvarandi.

Mælt verður somuleiðis til, at søkt verður eftir einum arbeiðsleiðara skjótast gjørligt.

Uppskotið er rættað tann 22. mei 2008 samsvarandi niðurstøðuni hjá teknisku nevndini til fundin í fíggjarnevndini 23. mei 2008.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. mei 2008 og mælir einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini frá 21. mei 2008 um "Reglugerð fyri teknisku deildina hjá Fuglafjarðar kommunu" við broyting til Kap 13 § 58, har tað verða býráðsskrivarin og býarverkfrøðingurin, sum koma at hava samrøður við einstøku arbeiðsfólkini, og ikki borgarstjórin og býráðsskrivarin (uppskot). Reglugerðir verður sett í gildi tann 29. mei 2008 eftir at endalig avgerð er tikin av býráðnum.

Somuleiðis mælir nevndin eisini býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini um at søkja eftir einum arbeiðsleiðara skjótast gjørligt.

**Avgerð:**
Málið fekk drúgva umrøðu á fundinum, og varð samtykt at taka tað av skránni og beina tað aftur í fyrisitingina/teknisku nevndina til víðari viðgerðar. (9-0). Somuleiðis verða býráðslimir at koma við sínum viðmerkingum til uppskotið skrivliga, so hesar kunnu verða tiknar við í komandi viðgerð av reglugerðini, sum løgd verður aftur fyri býráðið á fundinum 26. juni 2008.

Somuleiðis varð málið um arbeiðsleiðara útsett til endaliga støðutakan á komandi býráðsfundi, grundað á at hetta starv er partur av reglugerðini Kapitul 4 § 8.

**Mál nr. 30/2008.**

**Mál um tilbúgving í sambandi við oljudálking.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá havnanevndini, dagfest 21. mei 2008 um viðgerð og tilmæli á fundi í nevndini tann 19. mei 2008 um keyp av tilbúgvingarútgerð í sambandi við møguligari oljudálking.
Víst verður til, at í sambandi við stóru oljugoymsluna, sum er gjørd á Enninum, og sum verður tikin í nýtslu tann 01. juli 2008, so eigur hóskandi tilbúgvingarútgerð at verða útvegað, soleiðis at møguleiki er, at sleppast lann undan møguligari oljudálking, um skaði hendir og olja kemur á sjógv.

Støðan á økinum í dag er, at Fuglafjarðar havn hevur umleið 200 metra sperru, sum sýgur olju og lýsi. Eisini hevur Statoil 200 metrar av sperru av merkinum "NOFI 250 BOOMBAG", sum ætlanini er um at seta út á endan á pierinum.

Aftrat hesum verður mett, at neyðugt er við hóskandi útgerð á nýggju oljubryggjuni, og at tørvur er á eini trumlu við 350 metur av oljusperru við fríborði 450 mm., og einum skimmara at taka olju upp við, sum kemur á sjógvin.

Havnanevndin mælir á fundinum til, at skimmari og trumla við 350 metrum av oljusperru við fríborði 450 mm verður keypt.

Nevndin heitir á fíggjarnevndina um at fáa oljufeløgini og P/F Havsbrún at luttaka við eini munandi upphædd av íløguni, sum mett verður at koma at kosta umleið 1,6 mió. tilsamamans.

Fyrisitingin hevur kannað viðurskiftini viðvíkjandi kommunala partinum av íløguútreiðslunum av m.a. tilbúgvingarútgerð í sambandi við møguliga oljudálking, og vísir seg, at sambært løgtingslóg nr. 59 frá 17. mei 2005 um "Verju av havumhvørvinum" so er tað í okkara føri kommunan, sum skal bera allar útreiðslur av tilbúgvingarútgerð, tá tað snýr seg um at basa dálking av havnum, bryggjum, bátahyljum v.m.

Her verður víst Kapittul 14, tilbúgving, § 22, stk. 2: "Kommunustýrið hevur ábyrgd av at basa olju- og kemikaliudálking í havnum, herundir fram við bryggjum og havnarløgum og í bátahyljum", so tað er heilt greitt, hvør hevur ábyrgdina bæði rakstrar- og íløguliga á økinum innan fyri havnamerkið, tá tað snýr seg eitt nú um møguligar oljudálkingar.

Í uppskoti til kunngerð um bunkring av olju í føroyskum havnum og á sjónum, § 13 um tilbúgving stendur:

- *Stk. 1.* Veitarar og móttakarar skulu hava hóskandi útgerð at *fyribyrgja, avmarka og basa dálking við olju*, so sum tilfar, ið sýgur olju í seg.
- *Stk. 2.* Veitarar og móttakarar skulu hava eina tilbúgvingarætlan við útgerð og mannagongdum at fyribyrgja, avmarka og basa dálking, frábnoðan o.a.
- *Stk. 3.* Tann, ið hevur ábyrgdina av dálking í sambandi við bunkring, rindar útreiðslur, sum standast av at basa dálkingini.

Sambært viðmerkingum frá Kommunusamskipan Føroya til uppskotið, dagfest 2. september 2007 til § 13, eigur at lýsast heilt greitt, hvørja útgerð móttakarar skulu hava, tí vanligt hava t.d. fiskiskip ikki serliga umhvørvisútgerð umborð.

Viðmerkjast skal, at uppskotið um kunngerð um bunkring ikki er lagt fram aftur í Løgtinginum enn, men væntast má, at hetta verður gjørt í hesi tingsetu.

Fyrisitingin hevur verið í sambandi við oljufeløgini og P/F Havsbrún um at luttaka í fíggjarliga partinum av tilbúgvingarútgerðini, og hevur P/F Statoil (Mentir) boða frá, at teir luttaka við kr. 90.000,00. Aftrat hesum lata teir Fuglafjarðar havn "NOFI 250 BOOMBAG", sum verður settur á pierinum. Luttøkan hjá P/F Havsbrún enn ikki er komin upp á pláss.

Sambært góðkendu fíggjarætlan kommununar fyri 2008 er eingin peningur avsettur til "keyp av tilbúgvingarútgerð" undir bólki 2 ... 222000 Fuglafjarðar havn íløgur, og tí verður neyðugt við eini eykajáttan, um so verður, at útgerðin skal verða keypt í inniverandi fíggjarári.

Fyrisitingin tekur undir við, at útgerðin verður keypt í inniverandi fíggjarári, tá ið tað er lógarkravt, at kommunan sambært § 22, stk. 2 í LL nr. 59 frá 17. mei 2005 hevur ábyrdina av møguligum dálkingum í havnini, og haraftrat at stóra oljugoymslan á Enninum verður tikin í nýtslu 01. juli há. Sum støðan er ídag hevur kommunan ikki nøktandi útgerð tøka til størri oljudálkingar.

Fyrisitingin mælir sambært skrivi, dagfest 22. mei 2008 býráðnum til, at ein møgulig eykajáttan upp á max. kr. 1,6 mió verður veitt soleiðis, at kr. 500.000,00 verða tiknar av konto 222035 "Víðkan av havnarlagnum", har avsettar eru kr. 8,0 mió., meðan restin kr. 1,1 mió. verður fíggjað av innistandandi peningi.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

Nevnda eykajáttan ber eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan upp á max. 1,1 mió.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. mei 2008 og mælir einmælt býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá havnanevndini, og at ein eykajáttan til keypið verður veitt sambært tilmælinum frá fyrisitingini, dagfest 22. mei 2008.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá havnanevndini og fíggjarnevndini um at keypa tilbúgvingarútgerð móti oljudálking fyri max. kr. 1,6 mió. (9-0).
Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttan upp á max. kr. 1,6 mió. til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi í juni 2008. (9-0).

**<u>Mál nr. 31/2008.</u>**

**Umsókn frá Jóhann S. Andresson um byggiloyvi til tilbygning**.

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Jóhann S. Andresson, dagfest 24. apríl 2008 saman við tekningum um byggiloyvi til tilbygning í sethús síni á matr. nr. 187 Norðuri í Gerði 21 í Fuglafirði.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 16. mei 2008 og mælir býráðnum til, at byggiloyvi verður givið.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 32/2008</u>**.

**Umsókn frá Símuni Andreas Jacobsen um byggiloyvi til hjall og arbeiðsskúr.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Símuni Andreas Jacobsen, dagfest 14. apríl 2008 saman við tekningum um byggiloyvi til hjall og arbeiðsskúr á matr. nr. 587 á Mørkini 21 í Fuglafirði saman við grannaloyvi frá Mariusi Petersen, dagfest 14. apríl h.á.

Málið hevur verið viðgjørt á fundi í teknisku nevndini tann 15. apríl 2008, men varð tá samtykt at tosa við umsøkjaran og veita hjálp til at tekna ein vakrari bygning, enn ætlanin var at byggja.

Leif Petersen, byggifrøðingur hevur síðan gjørt uppskot, sum tekniska nevndin hevur havt til viðgerðar á fundi tann 16. mei 2008.

Nevndin varð samd um at mæla býráðnum til, at byggiloyvi verður givið sambært tekningina frá teknisku deild.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 33/2008.</u>**

**Umsókn frá Anold S. Simonsen um byggiloyvi til bilhús.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Arnold S. Simonsen, dagfest 14. mei 2008 saman við tekningum um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143z á Bøvegi 5 í Fuglafirði.

Garður er stoyptur, so talan verður um at stoypa ein góðan metur omaná verandi garð/grund og síðan leggja tak útyvir. Grannaloyvi fyriliggurb frá Malenu og Torkil Hansen, Olgu og Jóhannus Hansen og frá Jónvør og Jógvani Finni Poulsen, dagfest 14. mei 2008.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 15. mei 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið, soleiðis at brandmúrur verður gjørdur móti grannunum.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigurð S. Simonsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 34/2008.</u>**

**Umsókn frá Eyðuni Hansen um byggiloyvi til bilhús við bygningi oman á.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Eyðuni Hansen, dagfest 16. mei 2008 saman við tekningum um byggiloyvi til bilhús við bygningi omaná, sum skal verða nýttur til klinikk, á matr. nr. 198s Rossagerði 17 í Fuglafirði.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 21. mei 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært hjáløgdu tekning. Veggurin móti vegnum skal tola tunga ferðslu og verða gjørdur í samráð við teknisku deildina.

Veggurin móti matr. nr. 198v skal verða gjørdur sum brandveggur.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 35/2008.</u>**

**Viðvíkjandi tunnli av Kambsdali-Millum Fjarða.**

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 23. mei 2008 viðgjørt omanfyri nevnda mál, og varð samd um at leggja tað fyri býráðið til viðgerðar, við atliti til at senda nýggja umsókn til Vinnumálaráðið við avriti til Føroya løgting um gerð av nevnda tunnli.

Víst verður til umsókn kommununar, dagfest 17. januar 2007 saman við viðmerkingum og svarskriv frá Vinnumálaráðnum, dagfest 05. juli 2007.

Tá ið nýggj samgonga er skipað, so metir nevndin verða rættast, at býráðið viðgerð hetta mál, sum í síni tíð byrjaði í august mánaða 1978 við umsókn til Løgtingið saman við viðmerkingum.

Eisini eru ferðsluviðurskiftini bæði til og úr Fuglafirði munandi broytt til tað verra serliga fyri tungu ferðsluna, nú rundkoyring verður gjørd í Gøtudali, har ferðslan hjá akførum, sum varð úr 60-80 km. tíman, nú verður broytt til 0 í rundkoyringini. Kommunan sendi seinast í 2007 eitt mótmælisskriv til Landsverk um avleiðingarnar av at gera rundkoyring í Gøtu, uttan tó at hetta á nakran hátt varð tikið til eftirtektar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at heita á fyrisitingina um at gera uppskot til nýggja umsókn saman við viðmerkingum, og skal henda verða løgd aftur fyri býráðið til góðkenningar, somuleiðis sum samtykt varð at heita á vinnulívið um at stuðla umsókn kommununar til Vinnumálaráðið/Føroya løgting um tunnil av Kambsdali/Millum Fjarða. (9-0).

**<u>Mál nr. 36/2008.</u>**

**Viðvíkjandi ískoyti til leigusáttmálar millum kommununa og P/F Havsbrún á havnarøkinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 28. mei 2008 fingið áheitan frá P/F Havsbrún um at undirskriva ískoyti til leigusáttmálar millum kommununa og felagið á havnarøkinum, soleiðis, at útleigari góðtekur, at yvirtøuheimildirnar í leigusáttmálarnar frá 12. mars 2002, sum er latin FIH Erhvervsbank A/S við ískoytum 12. mars 2002, verða broyttir soleiðis, at rætturin til at yvirtaka leigumál partvíst verður latin til FIH Kapitalbank A/S.

Bankin kemur sostatt framyvir at verða fyrsti til at yvirtaka leigumálini, og eisini tær treytir, sum settar eru í ískoytini, dagfest 12. mars 2002, sum býráðið samtykti og undirskrivaði á fundi 19. mars 2002.

Útleigari góðtekur somuleiðis, at FIH Erhvervsbank A/S sum sekunderur panthavari eisini kann yvirtaka møguligar leigusáttmálar til somu treytir, sum settar eru í ískoytum, dagfest 12. mars 2002 við góðkenning frá FIH Kapitalbank A/S.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna ískoytið til leigusáttmálarnar millum kommununa og P/F Havsbrún, soleiðis at rætturin til at yvirtaka møgulig leigumál partvíst verður latin FIF Kapitalbank A/S, og at hesin fær fyrsta veðrætt, meðan FIH Erhvervsbank A/S framyvir kemur at hava annan veðrætt eftir FIH Kapiltalbank. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.10.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Elisabeth D. Eldevig

Signar á Brúnni

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Súsanna Gaard

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen